Avtalunnar dance makabre:

# Trygging fyri sjálvmálum

BERGUR P. DAM

Næstformaður í Javnaðarflokkinum



Nú váttar Sambandið, at nógv umrødda avtalan hjá Kaj Leo Johannesen ikki er til. Tað vistu vit frammanundan.

Jú, víst varð tosað um, hvørt ringvirkningar eftir at nýggj býráðssamgonga bleiv skipað, mundu fara at merkjast í landsstýrissamgonguni. Í royndunum at tryggja Fólkaflokkinum borgarstjórasessin skrædnaði Sambandsflokkurin og Heðin Mortensen gjørdist aftur limur í Javnaðarflokkinum.

Serliga vónsvikin tóktust fólkafloksumboðini at vera – tað var jú Fólkaflokkurin, ið misti borgarstjórasessin á stokkinum. Og vit – tað nógv umrødda baklandið – frættu, at onkur fólkafloksmaður mótvegis løgmanni hevði hug at leinkja hendingarnar rundan um býráðssamgonguna saman við landsstýrissamstarvinum.

Tó gjørdist endin, at semja varð um at halda skilna ímillum býráðs- og landsstýrissamgongurnar. Allir partar ásannaðu, at ongin hevði gagn av at tvinna hesar saman. Tí bleiv heldur ikki orðadrátturin so ógvusligur – eftir at frustrasjónirnar vórðu luftaðar, fjaraði av aftur.

Soleiðis kunnu vit siga, at ein útgangur var. Men nøkur avtala bleiv ikki gjørd – vit hoyrdu ikki um hana tá, og Lisbeth Petersen ásannaði í útvarpinum í gjárkvøldi, at "avtalan" var hennara uppfatan av útganginum.

Nú kunnu sambandstopparnir sjálvsagt siga, at eg ikki havi sitið á økslini á løgmanni og tískil ikki kann vita, hvat er sagt í einhvørji samrøðu.

Og tað er rætt. Men tó tosaði eg regluliga við hann um støðuna – eisini um vandan fyri at málini blivu tvinnað saman. Ongantíð lá annað á ljóði, enn at samgonguparternir máttu sannførast um at halda tingini frá hvørjum øðrum.

**Undirmeta løgmann og almenning**

Tá samanum kemur er uppáhald sambandsformansins ein ógvuslig undirmeting av løgmanni. Í roynd og veru vil Kaj Leo Johannesen vera við, at løgmaður skal hava gjørt eina avtalu, har hann skal áleggja limi í Javnaðarflokkinum at umboða annan flokk.

Umframt at stríða ímóti stýrisskipanarlógini hevði ein slík avtala verið politiskt sjálvmorð. Av røttum hevði hann tá – við brestin – verið koyrdur frá sum floksformaður.

Í útivið tvey áratíggju hevur Jóannes Eidesgaard staðið frammaliga á politiska pallinum. Hóast mong eru ósamd við honum, havi eg ongan hoyrt siga, at hann ikki dugir politisku spælireglurnar. Bara tað útihýsir sannlíkið fyri, at hann skal hava gjørt eina so ómøguliga avtalu. Uppáhaldið er horribult.

Hetta vita fólk, og tí er tað eisini ein undirmeting av almenninginum, tá sambandstoppurin nú roynir at krøkja løgmann upp í hesa sjálvuppfunnu avtalu.

**Sambandskt avtalulív**

Vanliga áleggja semjur, avtalur og samstarv øllum pørtum skyldur og rættindi.

Tað merkir so eisini, at tá partarnir eftir býráðsvalið semjast um at halda býráðs- og landsstýrissamstarvið frá hvørjum øðrum, skulu allir partar medvirka til, at støðan ikki læsir seg fasta. Allir partar mugu ansa eftir ikki at framprovokera eina konfrontasjón.

Um sambandsformaðurin heldur, at hann er friðhalgaður og ikki nýtist at taka atlit fyri samstarvsfeløgum sínum, kann endin lætt gerast ein fløkja, har eisini gomul sár kunnu skrædna uppaftur.

Og ymiskt bendir á, at hetta er hugburður sambandsformansins. Nú høvi beyðst, leyp hann beint útí – við samlaðum beinum og blundandi leyp hann beint á bláman. Og fekk ta konflikt, sum annars so lættliga kundi verið sloppið undan.

Samstundis sum hann tosar um gott samstarv og at liva upp til avtalur, hevur sambandsformaðurin ongan trupulleika av at tann, ið skrivaði undir samgonguskjalið, nú er uttan fyri samgonguna, men tó framvegis tinglimur fyri Sambandsflokkin. Tað hongur ikki saman.

So, tað kundi heldur verið Javnaðarflokkurin, sum brast við hurðum og rópti hart um avtalubrot. Tað er ikki altíð stuttligt at síggja ein samstarvpartnarar skjóta seg í fótin – aftur og aftur og umaftur.

# Sambandstrilogiin Edmund, Alfred og Kaj Leo

JÓGVAN VIÐ KELDU

Løgtingsmaður Fólkafloksins



**Sambandsflokkurin er við at gerast interessantur og nýskapandi, men ikki uttan trupulleikar fyri samgonguna og løgmann**

Tað er møguliga eitt sindur við síðuna av at kalla hesa sambandstrio eina triologi, men langt burtur er tað ikki, tí hesir tríggir í einleika eru einki minni enn eitt listarverk og nakað av fortíðar-framhaldi í føroyskum politikki.

Løgtingssamgongan hevur hildið til nógv, løgmaður hevur av og á gjørt avtalur, sum kanska eru eitt sindur ruflutar í kantinum, men at hann hevur givið Kaj Leo Johannesen, formanni Sambandsfloksins og Lisbeth L. Petersen, hvat hon so beinleiðis hevur við hetta at gera, tað lyfti, um trupulleikar gjørdust av floksopportunistinum, sum fluttur er úr Sambandsflokkinum til Javnaðarflokkin, so skuldi hann greiða fløkjnuna, so mótmæli eg at trúgva tí.

**Ein festligur flokkur**

Sjálvandi kann samgongan fáa trupulleikar, tað hevði ongan glett meiri enn Høgna Hoydal, men at Sambandsflokkurin er í størri trupulleikum, enn hann sjálvur ánar, er ein veruleiki. Hann er bara heilt festligur.

Fyri tað fyrsta hava vit góðtikið, sum eisini rætt er, at Alfred Olsen ikki er í samgonguni men í Sambandsflokkinum. Tó stuðlar hann okkum frá máli til mál.

Annað er, at Edmund Joensen, fyrrverandi floksformaður og sum táverandi løgmaður, avgjørt segði, at einki mál skuldi leggjast á tingborð, uttan at samgongan var samd, nú í óðum verkum leggur fram á løgting at gera Føroyar til eitt valdømi, har so gott sum flestu samgongutinglimir eru ímóti, er bæði ómoralskt og álátað.

Heldur ikki hevur hann gjørt nakrar konsekvensberokningar, kunngerðir ella lagt, sum er er minsta mark, hetta fyri samgonguna. Hetta skal bara skrumblast ígjøgnum.

Seinasta skotið á buðlinum er so, at formaður Sambandsfloksins ikki hevur gjørt sær tann ómak – og heldur ikki nakar í Sambandsflokkinum – ja, kanska Edmund og Johan, at hugsa um, at Heðin Mortensen ikki fór at taka sætið, sum hann eftir øllum demokratiskum reglum eigur, tað tykist løgið. So frætt áttu teir at kent hann.

**Gev samgonguni frágreiðing**

Sjálvur haldi eg, at her eigur at samankallast til samgongufund, so vit, sum mannað samgonguna, um ikki annað, fáa eina frágreiðing um, hvat gongur fyri seg og fáa snara kósini, so vit ikki enda úti í streymasjógvi ella enn verri í andøvsíðuni av berum óumhugsni. – Sambandsflokkurin má í hesum víðfevndu átøkum fáa loyst sínar trupulleikar.

Men alt í alt, haldi eg, at sambandstrioin Edmund, Alfred og Kaj Leo eftir øllum listarligum reglum kann metast við eina trilogi, og hon er avgjørt ikki óinteressant, men ikki uttan trupulleikar fyri samgonguna og løgmann.

# Opin spurningur til kringvarpsstjóran

SÓLVIT SIMONSEN

1. Er einki mar fyri, hvussu ljótar illbønir, ið verða lisnar í útvarinum?

2. Er hetta føroyska mentanin, ið lovar okkum gjøgnum útvarpið?

N. B. Ungdómur er viðbrekin og tekur skjótt eftir tí, sum fram verður borið



# Káta Hornið komið í handlarnar

**Nýggja føroyska fløgan hjá Teiti, Káta Hornið, kom seinnapartin í gjár í handlarnar. Hetta er fyrsta fløgan á føroyskum hjá Teiti sum einstaklingi.**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*

*nielsuni@sosialurin.fo*

Teitur hevur ferðast kring allan heimin við sínum tónleiki, og báðar enskmæltu fløgurnar hjá Teiti hava givið dámliga havnarmanninum nógvar fjepparar í fjarskotnum londum. Men hóast Teitur hevur verið sera lítið í Føroyum, síðan hann fyrstu ferð royndi sítt flog á altjóða tónleikapallinum, so hevur listarmaðurin altíð skrivað sangir á føroyskum, og á nýggju fløguni sleppa vit at hoyra nakrar av hesum. Teitur gav fyri nøkrum árum síðan saman við Niclas Johannesen fløguna Sólin & Regni út, á hesi fløgu fingu vit innlit í hvussu Teitur ljóðar á føroyskum. Men hetta var áðrenn yrkisleiðin hjá Teiti veruliga tók dik á seg, eisini var her talan um bólkin Sólin & Regni, og ikki um Teit sum einstakling.

Kristian Blak frá plátufelagnum Tutl, sigur við Planet.fo, at fløgan varð koyrd út í handlarnar í gjár, og at fyrst í juni er ætlanin at skipa fyri útgávu tiltøkum í Føroyum. Teitur er í løtuni staddur í Onglandi har enskmælta fløgan Stay Under The Stars nýliga er útgivin.

Í sambandi við útgávuna av Stay Under The Stars stovnaðu Teitur og umboðsmaður hansara Christian Ulf-Hansen egið plátufelag, men hóast hetta hevur Teitur valt, at givið hesa fløguna út hjá føroyska plátufelagnum TUTL, og hann leggur heldur ikki skjól á, at henda fløga er gjørd bert til føroyska og íslendska marknaðin.

Teitur hevur lagt eitt lag av nýggju fløguni Havnin er ein lítil bygd, á myspace síðu sína myspace.com/teitur